gult cyan magenta svart



# Høgni Hoydal: Vitleyst at hava fólkaatkvøðu 26. mai

**–Tað, sum nú er hent, er landaskomm, og tað er onki at ivast í, at sjampanju-propparnir raka loftið á Christiansborg í hesum døgum, sigur Høgni Hoydal**

FULLVELDI
*Áki Bertholdsen*

– Vit krevja, at tær avtalur, sum eru gjørdar, verða hildnar. Tí liggur bólturin ikki hjá okkum, men hjá fólkaflokkinum, sum hevur brotið avtalurnar.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í fullveldismálum, og formaður tjóðveldisfloksins, sigur, at tí vil tjóðveldisflokkurin hava uppskotini um fólkaatkvøðu verður borið niðan í tingið.

Men hann ásannar, at sum støðan nú er, har fólkaflokkurin hevur bakkað út, er tað vitleyst at halda fólkaatkvøðuna 26. mai, sum ætlað.

– Trúvirðið í tí, sum samgongan ger, er so lítið, at tað er vitleyst at hava fólkaatkvøðuna nú.

– Men vit hava alla tíðina sagt, at eru tað smálutir í avtaluni ímillum samgonguflokkarnir, eitt nú um dagsetingar, og annað, eru vit til reiðar at viðgerða tað í tinginum.

Tað merkir, at tjóðveldisflokkurin er til reiðar at halda fólkaatkvøðuna seinni í ár, eins og sjálvstýrisflokkurin hevur skotið upp.

Men hann leggur dent á, at tað er fólkaflokkurin, sum hevur brotið avtalurnar í samgonguni. – Tí er tað eisini fólkaflokkurin, sum hevur ein trupulleika og ikki tjóðveldisflokkurin. Tí liggur avgerðin um framtíðina hjá samgonguni heldur ikki hjá okkum.



*– Fyrst at kunngera eina fólkaatkvøðu, og so leypa frá, er so óseriøst, tað finnast valla orð fyri tí, sigur Høgni Hoydal*

**Landaskomm**

Høgni Hoydal sigur, at tað sum nú er hent, er einki minni enn landaskomm og tað er ómetaliga óheppið fyri trúvirðið í fullveldisætlanini.

– Eg ivist ikki í, at sampanjupropparnir raka loftið í Christiansborg í hesum døgum, tí nú hava teir vunnið ein stóran sigur, sigur hann.

– Men tíverri hevur hetta fyrilitarleysa trýstið úr Danmark ført við sær, at føroyskur politikkur er rætt og slætt blivin anarki.

Hann sigur, at hóast hann er landsstýrismaður í fullveldismálum, visti hann av ongum, fyrenn fólkaflokkurin leggur eitt uppskot fram av sínum eintingum um, hvussu farast skal fram.

– Men tað er eitt uppskot, sum ikki nevnir eitt orð um føroyskt fullveldi, men sum tvørturímóti viðurkennir danskan yvirvaldsrætt yvir Føroyum og sum limar okkum inn í danska ríkið.

Høgni Hoydal leggur dent á, at tað uppskotið er yvirhøvur ikki til viðgerðar.

– Hann sigur, at tað, sum er farið fram, er heilt óskiljandi.

– Tá ið vit samdust um at hava fólkaatkvøðu 26. mai. voru vit greið yvir, at tað fór at koma ein ógvuslig reaktión úr Danmark

– Áðrenn støða varð tikin til fólkaatkvøðuna 26. mai, umrøddu vit møguleikan fyri, at danska stjórnin fór at svara aftur við eini hóttan um at skerja blokkin eftir fýra árum.

– Kortini samdust vit um at halda fast um fólkaatkvøðuna. Vit vóru væl fyrireikað uppá hendan møguleikan, men vit høvdu gjørt okkum úra greitt, at vit máttu standa ímóti trýstinum úr Danmark. Vit høvdu gjørt okkum púra greitt, at tað vóru ikki danir, sum settu dagsskránna fyri eini fólkaaktvøðu, sum vit hildu í Føroyum.

– Tí er tað heilt óskiljandi, at Fólkaflokkurin bakkar nú.

Nú er Høgni Hoydal Løgmaður:

# Eg geri onki uttan at kunna samgonguna

**– Hvat eg so fari at gera ímeðan eg eri Løgmaður, fari eg sjálvsagt at kunna samgonguna um tað, sigur Høgni Hoydal**

FULLVELDI
*Áki Bertholdsen*

Í løtuni er Anfinn Kallsberg, Løgmaður í Bretlandi á almennari vitjan. Og hesar dagarnar, ímeðan hann er burtur, er tað Høgni Hoydal, sum er løgmaður.

Tað hevur ljóðað frá politiskum keldum í samgonguni, at Høgni Hoydal fór at brúka hetta høvi til at leggja uppskotið um fólkaatkvøðu fyri Løgtingið.

Hetta hevur Høgni Hoydal ongar viðmerkingar til.

– Eg havi ongar viðmerkingar til, hvat eg fari at gera, ella ikki, ímeðan eg eri virkandi Løgmaður, sigur Høgni Hoydal.

– Men eg fari í hvussu so er ikki at gera nakað, uttan at kunna okkara samgongufelagar væl og virðiliga.

–Men vit fylgja altíð gjørdum avtalum og siðvenjum í politikki, tí annars fer alt at flóta. Og tað, sum uræður mest av øllum, er, at føroyskur politikkur ikki verður gjørdur til eitt sirkus.

– Men tað sigur seg sjálvt, at vit góðtaka ikki, at avtalur verða brotnar, og at farið verður fram, soleiðis, sum fólkaflokkurin er farin fram, sigur virkandi løgmaðurin.

Spurningurin um, antin Høgni Hoydal eisini fór at brúka hetta høvi til at útskriva nýval, hevur eisini verið frammi. Men tað skilst, at har er umsitingin komin til ta niðurstøðu, at tað er bara Løgmaður sjálvur, altso Anfinn Kallsberg, sum hevur heimildina til tað.



*– Tað, sum umrædur mest av øllum, tað er, at føroyskur politikkur ikki verður gjørdur til eitt sirkus, sigur Høgni Hoydal*



# Tríati ár við Maersk Air




*1. mars hevur Maersk flogið millum Føroyar og Danmark í 30 ár*

**Fyrsta mars eru 30 ár liðin, síðan Maersk Air byrjaði at flúgva til Føroya. Dagurin verður hildin í Føroyum**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Maersk Air fer at hátíðarhalda 30 ára dagin fyri flúgvingini til Føroya hósdagin í komandi viku. Dagurin verður hildin umborð á Maersk flogfarinum, sum kemur fyrrapartin, eins og okkurt verður gjørt burtur úr í Føroyum eisini.

Við flogfarinum, sum kemur í Vágar klokkan 11 fyrrapartin, eru millum onnur Bjarne Hansen, skipsreiðari hjá Maersk, sum í fleiri ár var stjóri á Maersk Air, og Gunnar Tietz, fyrrverandi stjóri á Daniar. Tað var sum partur av Danair, at Maersk Air bygjaði at flúgva til Føroya fyri 30 árum síðan.

30 ára dagurin verður hildin á ymsan hátt, sigur Maersk Air í tíðindaskrivi.

Umborð á jubileumsflogfarinum, sum tey nevna hósdagsflogfarið, verður kapping millum ferðafólkini, har eitt av ferðafólkunum sum vinning fær ferðaseðilin fyri 30,- kr. Alt íroknað.

Talan er um at svara nøkrum spurningum. Millum røttu svarini verður so kastað lut. Og tann hepni vinnarin ferðast so millum Danmark og Føroyar fyri 30 krónur.

Tá flogfarið er lent, verður móttøka á flogvøllinum í Vágum fyri øllum ferðafólkunum, starvsfólki á flogvøllinum og øðrum viðskiftafólki.

**Stórur vøkstur**

Ferðafólkatalið við Maersk flogførunum hevur verið í stórum vøkstri seinasta árið. Í fjør flutti Maersk Air 55.942 ferðafólk millum Føroyar og Danmark, meðan talið í 1999 var 46.521.

Meginparturin av hesum vøkstrinum standa bíligu ferðirnar og tilboðini annars fyri.

Men hesin stóri vøkstruin hevur so eisini gjørt sítt til, at rutan millum Billund og Vágar eisini fer at halda fram veturin 2000/2001.

Hesi 30 árini, Maersk Air hevur flogið millum Føroyar og Danmark, hevur felagið flutt 1,2 milliónir ferðafólk í flogførum sínum, sigur Maersk Air í tíðindaskrivi í samband við, at 30 ár eru liðin, síðan Maersk Air byrjaði at flúgva til Føroya.

# Nýggjar milliónir til Smyril Line

**Smyril Line fekk um vikuskiftið 20 milliónir av nýggjum partapeningi í Føroyum**

PARTAPENINGUR
*Edvard Joensen*

Um vikuskiftið vórðu teknaðar 20 milliónir krónur av nýggjum partapeningi í Smyril Line. Allur hesin nýggi partapeningurin er føroyskur.

Óli Hammer, stjóri í Smyril Line, sigur, at talan er um føroyskt vinnuliv, sum nú hevur sett pening í. Í øllum førum, sigur hann, er talan um menn, sum eisini hava virki.

Óli Hammer sigur, at teir nú hava slept vónini um at nakar partapeningur fer at koma frá almennu Føroyum, nú Javnaðarflokkurin hevur tikið sítt uppskot um, at Løgtingið setir partapening í Smyril Line, aftur. Landsstýrismaðurin við vinnumálum, Bjarni Djurholm, hevur meldað greitt út, at Landstsýrið setir ongar pengar í Smyril Line.

Við hesum 20 milliónunum, sum komnar eru um vikuskiftið, hevur Smyril Line fingið tilsamans 80 milliónir av nýggjum partapeningi. Sostatt væntar teimum enn 45 milliónir, fyri at náa teimum 125 milliónunum, sum settar eru sum mál.

Tær 80 nýggju milliónirnar eru býttar soleiðis, at 50 teirra koma úr Hetlandi, 10 úr Íslandi og hesar seinastu 20 milliónirnar eru úr Føroyum.

Óli Hammer sigur, at arbeitt verður sjálvandi alla tíðina við at fáa tær manglandi 45 milliónirnar. Og hann dylur ikki fyri, at hann helst vildi fingið tær í Føroyuum, hóast allar útlendskar eisini eru vælkomnar.

Stjórin á Smyril Line sigur, at hann hevur samband við fólk, sum sinnað er at seta pengar í felagið, men hava enn ikki avgjørt nakra upphædd. Og tað eru nógv fólk, sum eru posistiv, tá tosað verður við tey, sigur hann. Men tøl verða ikki sett á nakað soleiðis beinanveg.



*Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, vónar at fáa allan partapeningin í Føroyum*

## Fullteknað til Aberdeen

**Nógv virkir nýta høvi at verða við á kunningartiltakinu m hjá oljufeløgunum tann 15. mars í Aberdeen**

Fullteknað er til Aberdeen, skrivar Vinnuhúsið, tað vil siga 66 persónar frá 39 virkjum vera við á túrinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag skipar í samstarvi við oljufeløgunum fyri einari workshop í Aberdeen tann 15. mars, har høvið verður at hitta umboð fyri nógvar av stóru undirveitarunum hjá oljufeløgunum.

**Hitta feløg**

Endamálið við tiltakinum er fyrst og fremst at kunna útlendsku veitararnar, sum vanliga arbeiða fyri oljufeløgini, um ætlanirnar í Føroyum og tey viðurskiftir, sum eru galdandi her. Út frá einum føroyskum sjónarhorni hevur tað serligan týdning, at kunnað verður um lógarásetingarnar um føroyska vinnuluttøku, soleiðis at útlendsku veitararnir skilja, at føroysk vinnuluttøka skal takast í álvara.

Á tiltakinum verður eisini kunnað um nakað av tí, sum er komið burtur úr samstarvinum millum oljubólkin hjá Arbeiðsgevarafelagnum og oljufeløgini seinastu mánaðirnar.

Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum sæst skrá fyri tiltakið og luttakandi útlendsk feløg. Umframt kunning gevur tiltakið føroyskari vinnu høvið at hitta nógv feløg, sum møguliga koma at spæla ein leiklut í komandi oljuleitingini, á einum stað, skrivar Vinnuhúsið.